# Kári leitar sær avbjóðin í brennidepli heimsins

**Ein av komandi døgunum fer 22 ára gamli havnarmaðurin Kári Jacobsen til Irak við donsku herdeildunum. – Tað primera endamálið við at fara til Irak er tann persónliga og einastandandi upplivingin, ið eg kann hava sum barlast restina av lívinum, segði Kári Jacobsen nakrar fáar dagar undan fráferðini til brennidepil heimsins, har skotvápn, spreingievni og check-points fara gerast ein partur av gerandisdegnum**

HERMAÐUR Í IRAK

*Stefan í Skorini*
*skorini@gjk.dk*

Tað er kalt og illfýsið, tá vit leggja leiðina út á Amager strand at taka myndir av einum ungum havnarmanni í snotiligum hermannabúna eina viku undan fráferðini hjá honum. Men skjótt verður tann óvanliga kaldi kontinentali danski veturin skiftur út við brennandi oyðimarkarsól skamt sunnanvert Basra, sum liggur í sunnara parti av Irak.

Kári hevur júst lokið eina tólv mánaða útbúgving í danska herinum, og nú er hann klárur at royna sín lærdóm úti í feltinum. Og hann dettur beint niður í eina krúttunnu í Miðeystri, har hann skal syrgja fyri, at uppreistrarbólkar og aðrir ófriðarkroppar ikki fáa fótin fastan í sunnara parti av Irak.

## Spentur, nervøsur og eitt sindur bangin

Tað er ein óvanliga róligur maður, sum vit fáa orðið á úti á Amager nakrar fáar dagar undan fráferðini til Irak. Atburður hansara boðar ikki frá, at gerandisdagur hansara brátt fær ein heilt annan dám. Um skamma stund verða skotvápn, bumbur og check-points ein fastur partur av gerandisdegnum hjá Kára.

Hóast Kári er púra róligur á at líta, er tað eitt ávíst álvarsemi, sum eisini eyðkennir mannin, tá vit práta um komandi ferð hansara.

– Eg eri spentur, nervøsur og eitt sindur bangin, ásannar Kári, tá hann verður spurdur, hvørjar kenslur bylgjast í barmi undan eini slíkari ferð.

Hann hevði sett í seg frá byrjan av, tá hann meldaði seg til herin, at hann skuldi til Irak. Hetta verður óivað ein uppliving, ið fer at mynda og brýna unga havnarmannin, sum er uppvaksin í hjartanum av Havnini.

– Eingin ivi er um, at tann persónliga upplivingin er tað primera endamálið við hesi ferðini, sigur Kári um motivatiónina at gerast partur av danska herinum.

– Men tað er samstundis gott, at vit fáa høvi at vera við í humaniterum arbeiði í økinum, har vit halda til. Eg kann ikki broyta heimin einsamallur, ta stuttu tíð eg eri har niðri, men mín innsatsur er partur av eini størri heild, sum vónandi fer at broyta støðuna til tað betra, heldur Kári fyri.

Hann greiðir frá, hvussu donsku herdeildirnar hava verið við í arbeiðnum at byggja eitt sjúkrahús, og at teir eisini hava gravað ein brunn saman við teimum lokalu íbúgvunum.

– Hetta er ikki tað mest spennandi, sum ruddar forsíðurnar í Danmark, men tað ger allan munin hjá tí vanliga irakanum, sigur Kári.

– Okkara høvuðsuppgáva hevur í veruleikanum ein humaniteran karakter. Vit skulu skapa tryggleika og frið fyri tey lokalu, men vit skulu eisini lata okkara íkast at skapa framburð í økinum sum heild.

## Mamman er óttafull

Nú Kári leggur leiðina til Irak, sita foreldrini eftir í Føroyum. Tey eru sjálvsagt bangin um sonin, ið hevur leitað sær persónligar avbjóðingar í einum krígsherjaðum landi.



*– Eg eri spentur, nervøsur og eitt sindur bangin, ásannar Kári, tá hann verður spurdur, hvørjar kenslur bylgjast í barmi undan eini slíkari ferð.*

*Mynd: Símun Jóannesarson*

– Mamma er sum mammur flestar. Hon er ræðuliga bekymrað um meg, og henni dámar tað einki, at eg nú skal avstað. Hon hevur havt eitt hálvt ár at venja seg við tankan, men eg haldi ikki, at hon hevur vant seg við hann enn, sigur Kári um reaktiónina hjá móður síni um komandi túrin hjá elsta soninum.

Hann leggur tó afturat, at foreldrini ikki eru tikin av fótum orsakað av ævintýrhugi Kára, og at tey ikki hava roynt at forða honum í at royna síni evnir í herinum.

Kári er ikki serliga fjálturstungin undan ferðini. Hóast hann nú skal til ein ófriðarligan part av heiminum, kennir hann seg ikki hóttan.

– Vit eru í einum lutfalsliga friðarligum parti av Irak, og av teimum 3000 donsku hermonnunum, ið tilsamans hava verið í Irak, er bert ein deyður av fíggindaligum álopum, sigur Kári.

Hann vil vera við, at hann kundi verið í nógv størri vanda, um hann eitt nú fjakkaði úti í heiminum, og tað verður vanliga ikki mett at vera serliga vandamikið.

Umframt tann eina hermannin, ið doyði av einari bumbu, sum lá við vegjaðaran, eru tveir aðrir hermenn farnir heim undir kistuloki. Tann eini varð raktur av sínum egnu í einum skotbardaga, og hin doyði at natúrligum ávum.

## Kári koyrir

Ta tíðina, Kári hevur verið í herinum, hevur hann lært seg at koyra Piranha, ið er eitt stórt skepilsi av einum hernaðarakfari. Hetta akfar vigar 16,5 tons, hevur átta hjól og kann í mesta lagi koyra 105 kilometrar um tíman. Hetta er motormegi, ið fleiri mannfólk óivað droyma um hava ræðið á.

Umframt at koyra Piranha hevur Kári eisini lært at skjóta við einari dysekanón. Hetta er eitt slag av basooka, og hvørt skotið kostar 8.000 krónur. So tað sigur seg sjálvt, at teir ikki hava skotið serliga nógv til stuttleikar við hesum vápninum.

– Tann danski herurin hevur sum oftast ta nýggjastu útgerðina, og ofta eru vit betri útgjørdir enn amerikanarar og bretar, og tað var eg rættiliga ovfarin av at hoyra, sigur Kári.

Uppgávan hjá Kára í Irak verður at sita við róðrið í hesum akfarinum. Saman við sær í akfarinum hevur hann ein gunnara, ið situr við skotvápninum, ið er ein 12,7 mm maskinbyrsa, og ein bólkaleiðara. Vanliga koyra teir saman í bólkum við seks hermonnum, t.v.s. tvey akfør í hvørjum fylgi.

– Høvuðsuppgávan hjá okkum verður at patruljera í okkara ábyrgdarøki við Basra. Vit skulu máta temperaturin í økinum fyri at tryggja okkum ímóti álopum. Tað er eitt fakta, at fleiri vilja hava okkum burtur úr Irak, og tí skulu vit ansa okkum, sigur Kári um tær dagligu uppgávurnar.

Vandin við at patruljera er, at hermenninir tá kunnu verða álopnir, tá teir eru á ferð. Oftast eru tað fjarstýrdar bumbur, ið liggja við vegjaðaran. Tær verða goymdar í burturkasti, deyðum djórum ella dekkum, og tí eru tær torførar at fáa eyga á.

Hetta kann vera ilt hjá okkum, sum liva eina fjálga og trygga tilveru í Vesturevropa, at ímynda okkum. Men trongdin eftir spenningi og nýggjum upplivingum hevur eftir øllum at døma fingið fastatøkur á tí unga havnarmanninum, sum nú skal vera til at skapa frið mitt í einum ófriðarligum parti av heiminum.

Umframt patruljering skulu donsku hermenninir seta upp mobil checkpoints, sum verða sett upp, tá teir skulu leita eftir vápnum og narkotika, ið verða flutt ígjøgnum økið. Eisini skulu teir samskifta við teir lokalu sjeikarnar og royna at savna upplýsingar um møgulig álop á tær sameindu herdeildirnar.

Ein annar partur av uppgávuni er at venja irakiskar hermenn, so at tann fremmanda hermegin einaferð kann taka seg aftur úr Irak. Fleiri operatiónir verða í dag framdar í felag við teimum irakisku hermonnunum.

## Tilafturskomið øki

Í einum landi, ið hevur verið merkt av kríggi, ófriði og einum harðrendum tyranni seinastu 20-30 árini, kann ein hermaður koma út fyri nógvum veruleikafjarum hendingum, ið vit vesturlendingar als ikki kunnu ímynda okkum.

Ein hending, ið stendur á heimasíðuni hjá danska herinum, kann møguliga geva okkum eina hilling av, hvussu tað er at vera staddur í einum ófriðarligum landi.

Nakrir danskir hermenn komu fram á eitt ferðsluóhapp uttanfyri Basra. Fleiri børn vóru rakt av einum persónbili, og tey høvdu øll tørv á bráfeingis hjálp. Donsku hermenninir gera seg til at hjálpa, tá tað brádliga verður skotið eftir teimum.

Hermenninir verða noyddir at taka seg aftur uttan at hava hjálpt øllum teimum skaddu frá ferðsluóhappinum. Teir fingu tó flutt nøkur av børnunum á sjúkrahús.

– Økið, sum vit koma til, er ómetaliga fátæksligt, hava vit fingið at vita. Fólkið hevur so at siga ongar hentleikar, ið eru sjálvsagdir hjá okkum í vesturheiminum, sigur Kári og leggur afturat, at eitt nú kunnu tey saniteru viðurskiftini mangan vera út av lagi vánalig.

Stutt frá Basra liggur Kuwait, ið beinleiðis flýtur í oljumilliardum. So skjótt tú fert um markið inn í Kuwait hevur tú fult upplýstar vegir, háhús og framkomna tøkni, men Irak liggur framvegis í sori orsakað av kríggi og vánaligari politiskari leiðslu.

Av tí at Irak hevur verið í fleiri kríggjum, síðan Saddam Hussein tók valdið, liggja stórar mongdir av spreingievni og rekast runt í landinum. Ein av uppgávunum hjá Kára og teimum verður at finna og tileinksgera slíkt lóður, ið kann vera ein stórur bági hjá tí vanliga irakanum.

## Skerpað tilbúgving

Danmark hevur ongantíð verið sjónligari á altjóða pallinum enn seinastu vikurnar. Hetta er sjálvsagt orsakað av teimum famøsu tekningunum av profetinum Muhammed, ið vórðu prent-

## FAKTA

Føddur 27. desember 1983
Foreldur: Óli og Kirsten (fødd Nielsen)
Útbúgving: FHS á Føroya Handilsskúla
Harumframt arbeitt hjá timburmanni og verið til skips
Fleiri upplýsingar um donsku herdeildirnar í Irak eru at finna á www.hok.dk